# Turið Torkilsdóttir

**Týr**

Vatnið rennur av høgum fjøllum
og eftir hvøssum gróti
So ilt er at leggja ást við hann
ið onga leggur ímóti

Dagurin líður, náttin kemur
dimmir á jørð so fríða
Í morgin saðlum hestar dyst at ríða.

"Tað er so vánt í tínum landi
tí har er veður og vindur
Nògv betri er í Noregs fjøllum
tú ástir við meg bindur."

Fylgdi hon honum so langt á leið
til gøtur tóku at skilja
"Tað, ið eg vendi aftur frá tar
tað er ei við mín vilja."

Turið situr í Noregs fjøllum
hon vekir harm og pínu
So møðig fellur hon blóðig tár
á báðar armar sínar

Dagurin líður, náttin kemur
dimmir á jørð so fríða
Í morgin saðlum hestar dyst at ríða.

Tištěno z pisnicky-akordy.cz
Sponzor: www.srovnavac.cz - vyberte si pojištění online!